FISKIVINNUTÍÐINDI

Eitt ræðuligt fantilsi

Brennistøðin hjá IRF kemur heilt í neyð, verður ILA sjúka staðfest í Oyndarfirði. Tey verða ikki liðug at brenna fiskin, sum varð tikin á Fuglafirði í fjør, fyrr enn í august, so tað, sum nú kemur aftrat, má bara aftur um í bíðirøðini

FISKASJÚKA
Edvard Joensen

Fiskur, sum raktur verður av ILA sjúku, skal takast og brennast. Tað er eingin annar møguleiki, sigur landsdjóralæknin.

Men í Føroyum hava vit ikki møguleika fyri at brenna hendan fiskin soleiðis í bræði. Fiskurin, sum tikin varð á Fulgafirði í fjør, er ikki allur fyribeindur enn. Tað verður ikki fyrr enn í august, at IRF er komið ígjøgnum ta nøgdina. Og tá stendur so væntandi aftur ein stórur dungi og bíðar.

Poul Andrias Joensen, stjóri á IRF, sigur, at tað er ikki tí, at ikki er víst á hesa vanlukkuna, sum nú er við at henda.

– Hetta er eitt forferdiligt fantilsi. Vit hava vitað leingi, at hetta fór at henda fyrr ella seinni, og hava gjørt vart við tað. Men tað hevur ikki verið áhugi hjá landsstýrinum at fíggja eina skipan, sum kann forkoma hesum burturkastinum.

Skal brennast

Fiskur, sum tikin verður á hendan hátt, skal brennast, sigur Bjørn Harlou, landsdjóralækni. Tað er eingin annar møguleiki.

Men tann møguleikin er ikki nøktandi í Føroyum, tí orkan er ov lítil her. Brennistøðirnar eru ov smáar.

Men við nýggju EU avtaluni, er latið upp fyri, at slíkt burturkast kann flytast út til onkran, sum hevur kapasitet til at brenna.

Tað hava norðmenn, sigur landsdjóralæknin. Men nokk so avgerandi er, um teir vilja hava hendan fiskin úr Føroyum. Siga teir nei til at taka í móti honum, fáa vit einki gjørt.

Brennistøðin í Leirvík klárar bara eitt tons um samdøgurði, tí hetta er burturkast við so ringum brennivirði, at ikki ber til bara at fylla í ovnin, uttan at køva hann.

Eftir stendur so, at burturkastið skal goymast onkrastaðni, til tað eigur tørn at sleppa í ovnin í Leirvík.

Seinastu tangarnir við fiski, sum varð tikin, tá ILA-sjúkan varð staðfest á Fuglafirði í fjør, má standa enn á gamla leirvíksvegnum. Verður sjúkan staðfest í Oyndarfirði, verður røðin bara uppaftur longri

Mynd: Edvard Joensen

Trupult og dýrt

Tað kann gerast sera trupult og sera dýrt at sleppa av við tiknan fisk upp á hendan mátan, sigur Poul Andrias Joensen, stjóri á IRF.

Í fyrsta lagi skulu tangar leigast at koyra slógvið í. Síðan skal pláss finnast at seta teir á, til teir kunnu tømast aftur.

Men tað er helst ikki bara sum at siga tað, at fáa hendur á slíkum tangum. Teir seinastu frá Fuglafjarðartøkuni standa enn, og teir, sum eftir koma, skulu so bara upp í røðina aftanfyri.

Poul Andrias Joensen, stjóri á IRF sigur, at hann hevur víst á, at ein vandi, sum kann standast av at hava hesar tangarnar standandi har í áravís, er gassspreinging. Fer hesin lorturin at gera, so ikki verður pláss í tangunum, og teir fara í luftina, verður ein heilt stór umhvørvisvanlukka burturúr, vísir hann á.

Ein annar spurningur verður so, hvussu lætt tað verður at fáa hendur á slikum tangum. Tí tað er ikki vist, at tað ber til at fáa tangar, sum eigarin vil hava bundnar í so langa tíð, sum væntast kann her. Og tað kostar øgiligar pengar fyri tann, sum skal leiga hesar tangarnar, vísir hann á. Tað verður so alifelagið, sum fer at standa við hesi rokningini.

Arbeiða við loysn

Fiskur hevur so mikið nógva vætu í sær, at hann brennir ikki líka væl, sum nógv annað burturkast. Tí verður roynt at turka tikna fiskin og síðan at brenna han.

Um tað hevði borið til, sigur Poul Andrias Joensen, hevði verið rættiliga nógv skjótari at beint hetta slógvið burtur. Samstundis skal tó finnast ein loysn at sleppa av við ta vætuna, sum kemur frá slógnum, sum turkað verður. Hon skal á einhvønn hátt sóttreinsast.

Men her er trupulleikin pengar. Tað kostar nógv at seta slíkar ætlanir í verk, og IRF er ikki ein fyritøka, sum selur eina framleiðslu, og soleiðis kann fáa inntøkur tann vegin. Skal IRF sjálvt standa fyri slíkum loysnum, verður tað brúkarin, sum sleppur at gjalda, og tað heldur stjórin hvørki vera rætt ella rímiligt.

Men sum er, er støðan tann, at landsstýrið ikki tykist vera sinnað at seta pengar til í eini slíkari ætlan, sigur stjórin á IRF.

Vandaleyst fyri toskin

ILA sjúkan, sum møguliga er komin í alibrúk á Oyndarfirði, er ikki vandamikil fyri vanliga fiskiskapin hjá føroyingum, sigur landsdjóralæknin

FISKASJÚKA
Edvard Joensen

ILA sjúkar er ikki vandamikil fyri tosk, hýsu og annan fisk, sum vanliga verður veiddur undir Føroyum. Tó kunnu upsi og sild møguliga fáa sjúkuna, sigur Bjørn Harlou, landsdjóralækni.

ILA sjúkan er virussjúka, sum serliga rakar laks. Tó er tað so, at annar laksafiskur, eitt nú síl, verður ikki sjúkur, hóast hann er smittaður og tann vegin kann verða smittuberari.

Tá fiskur verður smittaður við ILA virussi, sæst tað millum annað av, at livurin verður svørt, meðan táknurnar blikna.

Er sjúkan staðfest, er vanliga ikki annað at gera enn at taka fiskin av, og avbyrgja økið, har sjúkan er funnin.

Sjúkan smittar illa og kann verða borin á ymsan hátt. Eitt nú kann smittan flytast við streymi, skipum og bátum ella við útsloppnum laksi.

Bjørn Harlou, landsdjóralækni, sigur, at fiskur, sum er sloppin úr alibrúkum, helst er størsti smitteberarin yvirhøvur.

Tó er tann møguleikin til staðar, at eitt nú seiður kann vera smittaður og bera smittuna víðari. Hóast tað ikki er ávíst endaliga, sigur landsdjóralæknin, er sannlíkt, at sild og seiður/upsi kunnu fáa smittuna, men sum sagt ikki annar fiskur, tað vísindin veit av.

Titløk

Landsdjóralæknin væntar ikki, at ein møgulig ávísing av ILA í Oyndarfirði fer at ávirka útflutning okkara av øðrum enn alifiski.

Kortini er tað soleiðis, at verður sjúka staðfest í Føroyum, eiga vit at boða EU og altjóða stovninum fyri smittuberandi sjúkum frá. Mett verður so um, hvørt hendan sjúkan er so álvarslig, at tiltøk eiga at verða sett í verk.

Landsdjóralæknin sammetir slík tiltøk við tey, sum eitt nú verða sett í verk í samband við munn- og kleyvasjúkuna í Europa. Men landsdjóralæknin metir ikki, at møgulig tiltøk fara at verða annað enn fyribils innflutningsavmarkingar.

Men Oyndarfjørður verður stongdur, um sjúkan verður endaliga staðfest. Allur fiskurin verður tikin av fjørðinum, og eingin aling verður loyvd aftur í hvussu er fyrsta hálva árið.

Men Bjørn Harlou sigur tó, at tá fiskurin er tikin, verður aftur loyvt at sigla inn og út úr havnini í Oyndarfirði.

Sum dømi nevnir hann, at tann parturin av Fuglafirði, har alibrúkið, sum rakt varð í fjør, liggur, varð avbyrgdur, meðan fiskur enn var í ringunum. Men nú er aftur loyvt at sigla har.

Mangla kanning

Tosað hevur verið um at fáa egna fiskapatologiska kanningarstovu í Føroyum, so tær royndir og kanningar, sum gerast skulu, kunnu gerast her. Tað hevði gjørt, at vit kundu borið skjótari at, tá eitt nú illgruni um sjúkur stingur seg upp.

Útróðrarmonnum nýtist ikki at óttast fyri, at møgulig ILA-sjúka í alibrúkunum fer at skaða toskastovnin

Mynd: Edvard Joensen

Royndir av fiski úr Oyndarfirði eru, eins og gjørt varð í Fuglafirði í fjør, sendir til Noregs til kanningar. Tað tekur sína tíð, og alla hesa tíðina hevur smittan so møguleika at breiða seg.

Tá sjúkan var í Fuglafirði í fjør, varð tosað um, at vit eiga at fáa eina starvsstovu at taka sær av slíkum Men enn er hon so ikki komin.

Men hetta er kortini ikki nakað, sum gjørt verður eftir einum ári, sigur Bjørn Harlou, landsdjóralækni. Tað skal meira til enn so eitt nú at læra virusdyrking, sigur hann.

FISKIVINNUTÍÐINDI

Fáa onki endurgjald

–Alarar, sum missa alifisk av sjúku, fáa ikki endurgjald úr landskassanum. Men tað er alivinnan fyrireikað upp á, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður

SJÚKA Í ALIFISKI
Áki Bertholdsen

Alarar, sum missa fisk av sjúku, fáa onki endurgjald úr landskassanum.

Tað sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

Men hann leggur afturat, at hetta er alivinnan fyrireikað uppá.

Verður endaliga staðfest, at tað er herviliga fiskasjúkan ILA, sum er farin at gera um seg í Oyndafirði, kann tað skjótt gerast ein svárur, fíggjarligur smeitur fyri føroyska samfelagið.

Í øllum førum verður talan um ein álvarsligt bakkast fyri alibrúkið, har sjúkan er staðfest. Men fer smittan at breiða seg, kann tað gerast ein fíggjarlig vanlukka fyri alt samfelagið.

Alivinnan hevur nú ábyrgd av sær sjálvari og fær ikki endurgjald úr landskassanum fyri fíggjarligan miss av sjúku, ella av øðrum orsøkum, sigur Bjarni Djurholm

Fólk, sum eru køn í aling, eru vís í, at tað eru summi alibrúk, høvdu ikki megnað at borið ein slíkan miss, sum alibrúkið í Oyndafirði verður fyri, um talan er um ILA.

Í øðrum londum verður ofta tosað um alment endurgjald, tá ið tað verður neyðugt at drepa dýr fyri at avmarka smittuvanda.

Men hesa skipanina hava vit ikki í Føroyum.

Bjarni Djurholm sigur, at vit hava ein endurgjaldsgrunn til alivinnuna.

Men tað standa ikki meiri enn einar 15-16 milliónir í honum, og tað eru piparnøtur, tá ið hugsað verður um alivinnuna.

Harafturat skal grunnurin nú fyrst lata endurgjald fyri missin av ILA sjúkuni í Fuglafirði nakað síðani. Tey krøvini eru ikki gjørd upp enn. Men loypir nakað av, verður grunnurin tømdir og síðani verður hann tikin av.

Bjarni Djurholm sigur, at alarar fara tí ikki at fáa fíggjarligt endurgjald úr landskassanum fyri fíggjarligan miss av slíkum orsøkum.

– Vinnan hevur ábyrgdina av sær sjálvari og hon tryggjar seg sjálvan. Tað halda vit er tað greiðasta og ruddiligasta, sigur Bjarni Djurholm. Hann leggur afturat, at hetta er alivinnan fyrireikað uppá.

Støðan kann gerast álvarslig

Fiskasølustjórin heldur, at tess meiri vit tosa og skriva um fiskasjúkur, tess størri kann trupulleikin verða, tí tíðindi ferðast skjótt

FISKASJÚKUR
Áki Bertholdsen

Fiskasjúkur skulu takast í fullum álvara. Men vit eiga eisini at hugsa okkum um, so at vit ikki gera trupulleikan størri, enn hann er.

Tað heldur Hans Johannus á Brúgv, stjóri á Fiskasøluni.

Enn vita vit ikki, um talan er um ILA, sum er farið at gera um seg í Oyndarfirði.

Men er talan um hesa sjúkuna, kann støðan gerast álvarslig.



– Vit kunnu sjálvi gera trupulleikan størri enn hann longu er, sigur stjórin á Fiskasøluni, Hans Johannus á Brúgv

Men vit kunnu eisini bera okkum soleiðis at, at vit gera støðuna verri, enn neyðugt.

Fiskasølustjórin sigur, at kjøtvinnan er hart kroyst í hesum døgum og hjá henni hevði ein fiskasjúka ikki verið at kasta aftur.

Tí heldur hann, at vit eiga ikki at róta meiri í málinum, enn neyðugt, tí tíðindi frættast skjótt.

Stjórin á fiskasøluni sigur annars, at ES hevur ikki roknað Føroyar sum eitt sjúkuøki, tí eftir at sjúkan varð staðfest í Fuglafirði, hava vit ótarnað kunnað flutt alifisk út, við eini váttan um, at hann kemur ikki úr ILA øki.

– Men fer sjúkan at breiða seg skal tað takast í fullum álvara, tí tann fíggjarligi missurin kann gerast ógvuliga stórur.

Hann sigur, at í ár fara vit at útflyta eini 40.000 tons av alifiski. Útflutningsvirðið av tí liggur onkustaðni um eina milliard. So tað eru øgiligar upphæddir, vit tosa um.

Orri Vigfusson stúrin

Óttast Ísland verður næsta landið

Jústinus Leivsson
Eidesgaard

Ein av stríðsmonnunum fyri at varðveita stovnum av villum laksi í Norður atlantshavi, íslendingurin Orri Vigfusson er ógvuliga harmur at hoyra, at ILA sjúkan aftur hevur tikið seg upp í Føroyum.

– Vit stúra, men vit hava álit á, at føroysku myndugleikarnir fara at gera alt, sum stendur í teirra makt fyri at steðga smittuni, sigur hann.

– Vit halda, at nógv strangari reglur eiga at vera settar í verk, soleiðis at sjúkan verður fyribyrgd í framtíðini. Longu nú er sjúkan flutt úr Noregi til Skotland og nú Føroyar og vit óttast, at næsta landið verður Ísland. Sjúkan er longu í Kanada og har er hon eisini staðfest hjá villum fiski. Hetta er ræðandi.

Orri Vigfusson

sigur Orri Vigfusson.

– Vit fara at heita á allar tjóðir kring Norðuratlantshav at gera enn strangari reglur fyri at steðga sjúkuni. Vit far at heita á londinu um at løggeva soleiðis, at alarar beinanvegin hava skyldu at boða frá, tá slíkar sjúkur taka seg upp. Hesar reglurnar eru alt ov linar í dag. Alarar eru í mongum førum slett ikki skyldugir at boða frá, um fiskur gerst sjúkur. Vit halda, at tað eigur at verða ein almennur myndugleiki, sum ger av, hetit óheft av alarunum, hvat skal gerast. Hesin skal eisini hava rættin sjálvur at grípa inn. Djóralæknamyndugleikin í teimum ymsiku londunum eigur at gera eitt betri arbeiði enn hann ger í dag. sigur Orri Vigfusson.

– Stóra handilsketan í Bretlandi, Marks & Spencer hevur júst boðað frá, at eftirlit við sjúkum má gerast nógv strangari, skal fyritøkan framhaldandi selja úrdráttir frá alivinnuni, innaneftirlitið má gerast strangari, sigur Orri Vigfusson.

Vit gera tað, vit kunnu

– Vit fylgja teimum forskriftum, sum eru ásettar. Tí er tað ikki sannlíkt, at vit verða blokerað sum aliøki, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum

SJÚKA Í ALIFISKI
Áki Bertholdsen

Nú illgruni er um, at herviliga ILA sjúkan er farin at herja í alibrúki í Oyndarfirði, verða øll neyðug stig tikin, fyri at avmarka avleiðingarnar mest møguligt.

Tað sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

Hann sigur, at tað eru fastar mannagongdir, sum verða fylgdar, nú illgruni er um ILA í Oyndafjørður er avbyrgdur, arbeiðsklæðir skulu sóttreinsast, óviðkomandi mugu ikki koma á staðið, o.s.f.r

– Seinni í hesi vikuni verður endaliga staðfest, um talan er um ILA ella ikki. Og verður endaliga úrslitið, at talan er um ILA, verða uppaftur aðrar mannagongdir settar í verk fyri at smittan ikki skal breiða seg. Tað fyrsta, sum tá hendur, er, at fiskurin, sum er sjúkur, ella hevur sjúkueyðkenni, verður tikin og fyribeindur. Fiskurin, sum so er eftir, verður tikin so skjótt sum gjørligt, men hesin fiskurin kann seljast. Síðani verður aliøkið lagt at hvíla í eina tíð, áðrenn aling kann takast upp aftur.

Landsstýrismaðurin sigur, at tað, sum er umráðandi fyri okkum, er í fyrstu atløgu, at fáa staðfest um talan er um ILA, ella ikki.

– Er talan um sjúku, er tað síðani umráðandi at forða fyri, at smittan breiðist.

Hann sigur, so vítt hann veit, eru tær mannagongdir, vit hava, í samsvari við tær altjóða ásetingar, sum eru og tí kann hann ikki hugsa sær, at vit fáa gjørt meiri, enn vit gera og hava gjørt.

Taka til eftirtektar

Bjarni Djurholm sigur, at verður sjúkan staðfest, kann ES á pappírinum sýta fyri, at innflyta alifisk úr Føroyum verður.

Men hann kann kortini ikki hugsa sær, at ES fer at taka hetta til eftirtektar, at vit fylgja teimum mannagongdum, sum eru. Tí heldur hann avgjørt ikki, at útflutningurin av laksi kemur í vanda, hóast sjúkan verður staðfest.

– Men hendir so tað, at smittan breiðir seg til onnur øki í landinum, stendur tað til keyparan at gera av, um hann vil keypa, ella ikki. Á pappírinum kann ES gera av, at Føroyar eru eitt sjúkuøki og nokta fyri at føroyskur laksur verður innfluttur, til støðan er broytt.

– Tað, sum nú hendir, er, at vit boða ES frá, at vit hava illgruna um ILA. Tá ið so úrslitið av royndunum er komið, boða vit ES frá av nýggjum.

– Men eg kann ikki hugsa mær, at ES fer at blokera Føroyar sum aliøki, tí vit fylgja teimum altjóða forskriftum sum eru -og so eru vit eisini dugnaligir alarar, sigur Bjarni Djurholm